Kommunufelagið

**Til Umhvørvismálaráðið**
*Stílað: Margit Stórá, landsstýriskvinnu*

# Tilmæli frá umboðunum fyri Kommunufelagið

viðvíkjandi skipan fyri, hvussu framleiðslueindir, sum serliga eru ætlaðar til egna nýtslu hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum, kunnu verða knýttar í elkervið, sambært pkt. 10 í semjuskjalinum millum Føroya Landsstýrið, Kommunufelagið og SEV, sum varð undirritað 22. mars 2022.

**Arbeiðssetningurin:**
At orkumyndugleikin og lutafelagið SEV gera skipan fyri, hvussu framleiðslueindir, sum serliga eru ætlaðar til egna nýtslu hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum, kunnu verða knýttar í elkervið.

**Arbeiðsbólkurin:**

- Hilmar Høgenni (formaður), Sigurð í Jákupsstovu og Ari Johanneson vegna Føroya Landsstýri
- Tórbjørn Jacobsen, Hans Kári Vang og Bogi Bech Jensen vegna Føroya Kommunufelag

**Viðvíkjandi vindorku:**
Orkumyndugleikin og Sev hava í samsvari við Pkt 5 gjørt semju um eina tíðarfesta útbyggingarætlan av el-framleiðsluni í Føroyum. Framleiðslan av vindorku er í løtuni ríkiliga stór, og útbyggingarætlanin tryggjar ein nøktandi vøkstur í framleiðsluni av vindorku komandi árini. Verður yvirskot av vindorku frá framleiðslueindum hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum leitt inn á netið, vil tað sostatt einans troka aðra vindorku burtur. Verður vindorka trokað burtur, sum brúkarin framvegis skal gjalda fyri, verður streymurin dýrari hjá vanliga brúkaranum.

Í samsvar við Pkt 6 í semjuskjalinum er nú ásett í Elveitingarlógini (§ 15 h, stk. 4), at "*SEV kann gera avtalur um prís til størri kundar, sum eitt nú eru íbundnir háspenning, ið kunnu veita SEV skipanarberandi tænastur ella taka ímóti el, sum annars ikki hevði verið gagnnýtt".* Orkukrevjandi vinnufyritøkur kunnu sostatt longu í dag keypa yvirskots vindorku til ein lægri prís frá Sev. Í staðin fyri, at Sev skal keypa yvirskots vindorku frá orkukrevjandi vinnufyritøkum, vilja kommunalu umboðini heldur mæla til at menna skipanir, har Sev selur yvirskots vindorku til orkukrevjandi vinnufyritøkurnar. Fyri orkukrevjandi vinnufyritøkur eru hesar skipanir longu fíggjarliga áhugaverdar í dag, og um eitt gott ár, tá ið nýggj prísskipan við skiftandi tímaprísum verður sett í verk, gerast tær uppaftur meira áhugaverdar.

Umboðini fyri Kommunufelagið síggja tí onga skilagóða orsøk til, at orkukrevjandi vinnufyritøkur fáa loyvi at seta vindmyllur upp til egna nýtslu.

Kommunufelagið

**Viðvíkjandi sólorku:**
Tá tað kemur til framleiðslueindir til egna nýtslu, eru kommunalu umboðini av teirri áskoðan, at orkukrevjandi vinnufyritøkur, eftir ávísum treytum, eiga at fáa loyvi til at knýta sólorkuframleiðslu í elkervið. Sólorka trokar burtur oljurikna framleiðslu og er tí serliga væl egnað til grønu umleggingina.

Elveitingarlógin (§5, stk. 3, 1) loyvir framleiðslu úr sólorku á egnum bygningum uttan útboð. Tí er ikki neyðugt at broyta elveitingarlógina í hesum sambandi, um so er, at parkeringsøki og annað disponerað øki eisini verða roknað sum egin bygningur.

**Tilmæli frá kommunalu umboðunum viðvíkjandi pkt 10:**

***Viðvíkjandi vindorku:***
- Mælt verður frá, at orkukrevjandi vinnufyritøkur fáa loyvi at seta vindmyllur upp til egna nýtslu.

***Viðvíkjandi sólorku:***
- Mælt verður til, at orkukrevjandi vinnufyritøkur kunnu seta framleiðslueindir við sólkyknum upp á disponerað øki á egnum matrikuli sambært hesum treytum:
    1. at framleiðslueindirnar eru ætlaðar til egna nýtslu og tí ikki eru væl størri enn mesta nýtslan.
    2. at framleiðslueindirnar skulu bindast í “uttanfyri elmálaran”, sum merkir, at øll framleiðsla og nýtsla verður máld. Í hesum sambandi skal SEV geva fyritøkuni atgongd til dátur, so fyritøkan sjálv kann rokna, hvussu grøn orkunýtslan er tíma fyri tíma.
    3. at øll framleidd sólorka verður seld til SEV, og at søluprísurin verður framleiðsluprísurin á trokaðu elorkuni tíma fyri tíma.
    4. at øll elnýtsla verður keypt frá SEV, og at keypsprísurin verður sambært nýggju prísskránni (vísandi til §15h í elveitingarlógini).

Vegna Kommunufelagið, 21. mai 2025

Torbjørn Jacobsen | Bogi Bech Jensen | Hans Kári Vang

**Tórshavn 21 mai 2025**

**Tilmæli til landsstýrið**

Um skipan fyri, hvussu framleiðslueindir, sum serliga eru ætlaðar til egna nýtslu hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum, kunnu verða knýttar í elkervið, sambært pkt. 10 í semjuskjalinum millum Føroya Landsstýrið, Kommunufelagið og SEV, sum varð undirritað 22. mars 2022.

**Arbeiðssetningur**

- Orkumyndugleikin og lutafelagið SEV gera skipan fyri, hvussu framleiðslueindir, sum serliga eru ætlaðar til egna nýtslu hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum, kunnu verða knýttar í elkervið.

**Arbeiðsbólkurin**

Hilmar Høgenni, formaður, Sigurð í Jákupsstovu og Ari Johanneson vegna Føroya Landsstýri

Tórbjørn Jacobsen, Hans Kári Vang og Bogi Bech Jensen vegna Føroya Kommunufelag

Arbeiðsbólkurin hevur býtt seg í tveir bólkar við hvør sínum tilmæli.

**Tilmæli**

**Hilmar Høgenni, Sigurð í Jákupsstovu og Ari Johanneson mæla til:**

- Orkukrevjandi vinnufyritøkur kunnu seta varandi orkuverk upp til egna nýtslu
- Framleiðslumátturin skal ikki vera størri enn 10% yvir mesta tørvin, sum orkukrevjandi fyritøkan hevur til sítt virksemi.
- Avlop frá framleiðsluverkunum kann leiðast inn á elnetið hjá SEV
- Bert SEV kann keypa avlopsorku frá eginframleiðara, hetta eftir tørvi og frammanundan ásettari prísskipan

**Um arbeiðssetningin**

Orðingin í pkt. 10 letur upp fyri, at orkukrevjandi fyritøkur kunnu gera framleiðsluverk, sum eru ætlað til egna nýtslu. Talan má tí vera um lutfalsliga stór framleiðsluverk, sum framleiða grøna orku til egna nýtslu.

Framleiðslueindirnar skulu nýta elkervið hjá SEV, og skulu rinda ein nærri ásettan kostnað fyri íbinding og fyri neyðugar tænastur frá elkervinum (t.e. gjald fyri flutning av el og fyri stabilisering av netinum).

Íbindingarkostnaður og leypandi netgjald skulu vera við til at rinda rakstrarútreiðslur, viðlíkahald, rentur og avskrivingar av elnetinum.

Nágreinast skal, hvussu íbindingargjald og netgjald verða roknað og fyri hvørjar tænastur tað er grundað á. Eitt atlit, sum skal havast í huga er, at kostnaðurin av at leggja nýggjan háspenningskaðal er høgur, og tí er neyðugt at taka hóskandi atlit at váðanum í verkætlanini[1].

**Vindur og sól**

Tað kann vera torført at gera eins reglur fyri sól og vind, tí framleiðslu profilarnir eru so ymiskir.

Eitt sólorkuverk uppá 1 MW hevur tørv á nógvum plássi, áleið 5.000 fermetrum. Framleiðslan frá verkinum er umleið  650.000 kWt/ár.

Eitt vindorkuverk uppá 1 MW, ella ein mylla uppá 1 MW kann framleiða áleið 4.000.000 kWt/ár ella um 6 ferðir meiri enn sólorkuverkið.

Løgtingslóg um el og fjarhita setur ikki krav um alment útboð, tá ið talan er um sólorku á tekjum. Tó er ásett, at um verkið er størri enn 200 kW, so kann verkið ikki verða íbundið innanfyri elmálaran.

**Nærri ásettar treytir fyri framleiðsluverk til eginnýtslu**

SEV veitir ikki tiltøkumátt til eginframleiðara/-brúkara. Hetta merkir, at tá eingin ella lítil eginframleiðsla er skal eginbrúkarin hava egnan tiltøkumátt tøkan. Eginframleidd orka verður flutt umvegis elnetið hjá SEV frá framleiðslustaði til eginbrúkaran.

SEV tekur eginframleidda orku inn á netið svarandi til eginnýtsluna. Um eginnýtslan minkar, so verður eginframleiðslan minkað samsvarandi. Eginnýtslan kann ikki vera hægri enn eginframleiðslan.

Tá varandi orka vantar á elnetinum, kann SEV keypa møguliga avlopsorku frá eginframleiðara eftir nærri ásettari prísskipan. Møgulig avlopsorka er tøk orka ÷ eginnýtslu.

SEV hevur ikki skyldu at keypa avlopsorku frá eginframleiðara, og tað er bert SEV, ið kann keypa orku frá eginframleiðara.

---

[1] Netgjaldið fyri háspenningkaðal til orkukrevjandi fyritøku kann vera samansett einum íbindingargjaldi, einum føstum leypandi gjaldi og kostnaður pr kWt.

**Stødd á orkuverkunum til eginnýtslu**

Stór vindorkuverk verða skilmarkaði sum verk omanfyri 10 MW og stór sólorkuverk sum verk omanfyri 1 MW.

Verk sum eru ætlaði til eginframleiðslu og eginnnýtslu skulu dimensionerast soleiðis, at mesti máttur er ikki hægri enn 110% av mesta tørvi hjá viðkomandi eginframleiðara.

Eginframleiðarin skal gjalda íbindingargjald, fast gjald og gjald fyri flutning og stabilisering av orku á elnetinum hjá SEV.

SEV stýrir framleiðslueindunum soleiðis, at eginframleiðsla og eginnýtsla javnviga.

Prísskipan skal ásetast fyri keyp av avlopselorku frá eginframleiðara. SEV er ikki bundið at keypa avlopselorku, og kann tí eisini til eina og hvørja tíð velja ikki at keypa.

SEV veitir ikki tiltøkumátt til eginbrúkara. Hetta merkir, at tá eingin ella lítil eginframleiðsla er, skal eginbrúkarin hava egnan tiltøkumátt tøkan.

Eginbrúkari skal hava aðra íbinding í netið, sum er ætlað aðrari nýtslu, sum ikki er skilmarkað sum eginnýtsla.

**Tórshavn 21. mai 2025**

| Hilmar Høgenni | Sigurð í Jákupsstovu | Ari Johanneson |
|---|---|---|
| Umhvørvismálaráðið | Umhvørvisstovan | Umhvørvisstovan |

**Orkuskiftið, samhaldsfasta skipanin og íløguvági**

Vinnan hevur skjótt vaksandi tørv á grønari elorku. Bólkurin Landbúnaður, fiskiveiða, aling og tilfarsvinna er vaksin úr 4% í 1997 til 26% í 2023.

Komandi árini eru stórar elektrifiseringar av vinnuligari framleiðslu settar á skrá, og enn koma einans umleið 12% av samlaðu føroysku orkunýtsluni frá elorku. Um vit innan rímuliga tíð skulu náa at gera eitt skifti frá oljugrundaðari orkunýtslu, til elorkunýtslu, er neyðugt at vinnan eisini fær møgleikar at gera íløgur í framleiðsluverk til eginnýtslu.  Umframt, at vinnan við hesum fær møguleika at seta størri ferð á orkuskiftið, eru eisini fyrimunir við at íløguváðin lutvíst verður fluttur frá elbrúkaranum til vinnufyritøkurnar, ið gera íløgur í eginframleiðsluverk.

Við tað, at allur flutningur av elorku skal umvegis elnetið hjá SEV, verður samhaldsfasta skipanin ikki sett í vága, við at loyva vinnufyritøkum at gera íløgur í eginframleiðsluverk. Hinvegin kann slík skipan styrkja elskipanina munandi og verða við til at orkuveitingin í Føroyum gerst bíligari og meiri burðardygg fyri alt samfelagið.

